# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

## KLIPP, KLIPP

Í dag er Grækarismessa, og eftir ein langan, kavaklæddan vetur eru nú fyrstu ábendingarnar um várið og heitari tíðir í luftini. Og tjaldrið, sum nú kemur til landið, skal verða vælkomið. Grækarismessudagur er almennur flaggdagur, so í dag kann Merkið veitrað í húnarhátt. Fleiri grækarismessuhald verða kring landið sunnudagin.

**GRÆKARISMESSA**

Fríggjadagur 12/3

## REINFØRI Í MATGERÐ

Húsaarhaldsskúlsi Føroya skipar fyri skeiði í matvørureinføri og heilsugóðum kosti. Skeiðið varðar teir dagar, og har kanst tú læra at hugsa um góðan mat til tín kropp og gott reinføri í køkinum.

Skeið í matvørureinføri

**HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA**

Hósdagin 18/3 og fríggjadagin 19/3





## TRIÐJI SALANDER-FILMURIN

Nú er triðji og seinasti filmurin í Millennium-røðini komin út sum dvd. Luftkastellet der blev Sprængt bjóðar eina nýggja spenningssøgu við Lisbeth Salander og Mikael Blomkvist. Í hesum filminum gravar Blomkvist í fortíðini hjá Salander fyri at koma nærri sannleikanum um hana.

**LUFTKASTELLET DER BLEV SPRÆNGT**

dvd-filmur



## NÝTT FRÁ GOMLUM DØGUM

Jimi Hendrix er kanska kendasti gittarspælari nakrantíð, og tað tykist sum søvnini við hansara gittarspæli eru endaleys. Hóast tað eru 40 ár liðin, síðani Hendrix doyði sum ungur maður, koma framvegis nýggjar upptøkur við honum út. Hendan útgávan bjóðar 12 slíkar upptøkur og tveir nýggir sangir frá gittarlegenduni.

Jimmy Hendrix

**VALLEYS OF NEPTUNE**

Sony Music



## SKRIVA UMSÓKN

Tú kanst eisini velja at brúka komandi dagarnar til at skriva eina umsókn um týðarastuðul. Stuðul til at týða skaldskap úr føroyskum til annað norðurlendskt mál er leysur at søkja. Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 1. Oktober í ár, og umsóknarbløð fáast á www.nlh.fo

Umsókn um týðarastuðlul

**WWW.NLH.HO**

Fyri 1/10




## JAVNAÐAR-LEGENDAN

Hóast hann ongantíð gjørdist forsætisráðharri verður Svend Auken roknaður millum teir mest týðandi javnaðarmenninar í Danmark farnu árini. Auken doyði í august mánaði í 2009, og hendan bókin hjá honum er eitt slag av politiskum testementi. Hans Mortensen hevur tosað við Svend Auken um javnaðarrørsluna fyrr, nú og í komandi døgum.

Hans Mortensen

**DET, SVEND MENER, ER...**

Gyldendal



## FIMM MINUTTIR Í HIMMIRÍKI

Í 1974 verður 11 ára gamli Joe Griffin vitni til, at beiggi hansara verður skotin. Tvær vikur seinni verður 17 ára gamli drápsmaðurin Alistair Little tikin, og seinni verður hann dømdur í fongsul. Filmurin fylgir lívinum hjá Joe og Alistair – tveir menn úr sama býi, sum standa hvør sínum megin eina deyðaliga gerð. Filmurin byggir á veruleikan, og høvuðsleikarar eru Liam Neeson og James Nesbitt.

**FIVE MINUTES OF HEAVEN**

dvd-filmur